FISKIVINNUTÍ‹INDI

Skei› í Øravík um oljudálking

OLJUVERND
Áki Bertholdsen

Gistingarhúsi› í Øravík ver›ur um mána›arskifti› karmur um eitt stórt skei› um at basa oljudálking

Seinni í hesum mána›inum ver›ur stórt skei› í Øravík um oljudálking.

Nú Bjargingarfelagi› í Su›uroyar nor›aru helvt hevur keypt útger› at basa oljudálking vi›, ver›a eisini stig tikin tikin til at fyrireika føroyingar at arbei›a vi› slíkum ambo›um.

Fyribils er avgjørt at skipa› fyri skei›i um at basa oljudálking. Skei›i› ver›ur í Øravík um mána›arskifti› apríl, mei og ta› er fyriskipa› í samstarvi vi› Fiskimálast‡ri›, Vaktar- og Bjargingartænastuna og Statens Forurensningstilsyn, SFT, í Noregi.

– Hetta eru skei›, sum SFT eisini hevur í Noregi. Hetta eru skei›, sum eisini eru nyttug hjá okkum, tí her eru álei› somu reglar galdandi sum í Noregi, sigur Pauli Einarsson, sum er ein av stigtakarunum.

Skei›i› ver›ur fyri tey, sum hava ábyrgdina av hjálpararbei›num í teimum sjey størstu kommununum. Men harumframt tey, ver›ur skei›i› eisini fyri teir myndugleikar, sum natúrliga koma uppí arbei›i›, um ein oljudálking kuldi tiki› seg upp, eitt nú Fiskimálast‡ri›, Vaktar- og Bjargingartænastan, Heilsufrø›iliga Starvsstovan, Oljumálast‡ri› o.s.fr.

Pauli Einarsson sigur, at ta› er Fiskimálast‡ri›, sum rindar skei›i›, og ta› heldur hann vísir, at myndugleikarnir vísa sera gó›an vilja til at bøta um stø›una og at gera okkum so væl fyrireika› til oljuvinnuna sum gjørligt.

N‡tt frystihús skal eisini frysta til "Sancy"

Vágstrolarin "Sancy", sum er seldur til WalwisBay í Namibiu, fær gó›ar umstø›ur, tá hann kemur ni›ur. Sama felagi› sum hevur keypt skipi› lat í seinastu viku upp eitt spildurn‡tt frystihús í Walvis Bay. Verkætlanin kostar 80 milliónir føroyskar krónur og tá eru trolarar, kai og frystihús írokna›, skrivar íslendska vevsí›an Interseafood.com.

Rokna› ver›ur vi› at eini 540 fólk fara at arbei›a á virkinum. Sjálvur fiskimálará›harrin í Namibia, Abraham Iyambo lúttók í hátí›arhaldinum, tá frystihúsi› var› handa›. Hann seg›i, at sí›an Namibia loysti frá Su›urafrika vóru umlei› 100 milliónir US dollarar n‡ttir at gera íløgur í fiskivinnuna og at fiskivinnan í dag stó› fyri 8 prosentum av landsins inntøkum og gav 12-14.000 fólkum arbei›i.

Í dag eru 20 frystihús til fisk í Namibiu.

Gólvsølan 6. apríl

S‡slunummar	Skipanavn	Rei›skapur	Kilo
FD 424	Morning star	Snella	75
FD 492	Klettur	Lína	305
FD 588	Fugltúgvan	Lína	22
FD 720	Grunningur	Lína	517
KG 244	Ågot	Lína	1.548
KG 349	Polarstjørnan	Lína	3.033
KG 9	Klakkur	Lína	165
TG 227	Edvør	Snella	307
TN 407	Magnus heinason	Botntrol	234
VN 459	Vesturbúgvin	Partrol	434
			6.640

Ætla at vei›a háv

Midsund (NTB): Hávavei›a á djúpum vatni vestanfyri Írland, hetta er ætlanin hjá norska felagnum Sjøvik AS í Midsund.

Sjøvik skal reka línubátar fyri eitt írskt rei›arí, sum millum anna› ætlar at vei›a brúnháv, sigur NRK.

Felagi› skal eisini finna markna› fyri hávinu, í Frankaríki og í Ásiu. Brúnhávur kann n‡tast til matna og eisini sum heilivágur.

Føroyingar hava roynt nógv eftir hávi vi› línu gjøgnum árini. Teir hava drúgvar royndir og kanska hetta er eitt hugskot til at royna n‡ggjar lei›ir.

Bruix fekk 150.000 krónur í bót

Franski garnabáturin, sum í fjør summar var› tikin sunnanfyri Føroyar, har hann royndi uttan fiskiloyvi, fekk ikki vi›hald, tá máli› var fyri í Eystara Landsrætti í gjár. Skiparin var dømdur at gjalda 150.000 krónur í bót.

LIFEBOOK FARTELDA

FUJITSU COMPUTERS SIEMENS

C4345, Intel Celeron 650 MHz, 12,1" TFT SVGA display, 64 MB SDRAM, max 320 MB, 6 GB hard-disk, CD-drev og Floppy-drev, 56K V.90 modem, Mobile Security, 3 kg., Windows 98 við Word2000 og Works2000, 1 ára garanti.

Kr. 15.395,-

FÍGGING: Útgjald: **5.132,-**
Rest yvir 12 mðr.: **953 um. mðn.**
Rest yvir 18 mðr.: **660 um. mðn.**

Eyka RAM er á goymslu

3arin ELECTRONIC

SMS · Tel 353537 · Fax 353536 · E-mail: electr@post.olivant.fo